ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

24. november 2011
Mál: 11/00738-3
Viðgjørt: JPH

(Uppskot til)
Kunngerð um gjøld innan eldrarøktina

Við heimild í § 32, stk. 1 og 4 í "Lov for Færøerne om offentlig forsorg" sbrt. lógarkunngerð nr. 100 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 26. mai 2011, verður ásett:

§ 1. Pensjónistur sum fær uppihald á ellis- og røktarheimi ella á eldrasambýli, skal rinda eitt mánaðarligt gjald fyri vistarhaldið (húsaleiga, olja, el, mat, reingerð, felags útreiðslur o.t.).
Stk. 2. Á eldrasambýlunum verður gjaldið kravt inn av kommununum, og á ellis- og røktarheimum krevur landið gjaldið inn.
Stk. 3. Á røktarheimi og sambýlum í Sandoynni krevur landið gjaldið inn.

§ 2. Allir pensjónistar rinda fyri tænastuna á ellis- og røktarheiminum ella á eldrasambýlinum. Gjaldið er treytað av inntøkuni hjá pensjónistinum.

§ 3. Gjald sambært §§ 1 og 2 verða rindað, áðrenn 1. í tí mánaði, goldið verður fyri.
Stk. 2. Tá flutt verður inn á heimið, rindar pensjónisturin fyrstu ferð í endanum av tí mánaðinum, sum kemur aftaná mánaðin, flutt verður inn.
Stk. 3. Um pensjónisturin ynskir at innrætta býlið á serligan hátt, kann krevjast, at hann rindar fyri møguligar eykaútreiðslur fyri at seta býlið aftur í uppruna stand.
Stk. 4. Gjald sambært §§ 1 og 2 verður rindað seinastu ferð síðst í tí mánaðinum ein pensjónistur flytur út ella andast.

§ 4. Pensjónistur kann vera til umlætting á ellis- og røktarheimi ella á eldrasambýli í mesta lagi í 90 dagar í einum ári. Pensjónisturin rindar eitt gjald um samdøgrið fyri umlætting frá fyrsta degi.
Stk. 2. Goldið verður mánaðarliga fyri umlætting, eftir at tænastan er veitt.

§ 5. Pensjónisturin ger skrivliga avtalu um gjaldstreytirnar á ellis- og røktarheiminum ella á eldrasambýlinum, tá flutt verður inn.

§ 6. Allar gjaldsupphæddir sambært hesi kunngerð verða ásettar og javnaðar í kunngerð um áseting og javning av almannaveitingum.

§ 7. Hendan kunngerð kemur í gildi dagin eftir hon er kunngjørd og hevur virknað fyri gjøld innan eldrarøkt frá og við januar 2012.

Almannamálaráðið, 24. November 2011

Annika Olsen (sign.)
Landsstýriskvinna

/Eyðun Mohr Hansen (sign)

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 304045 • E-mail: amr@amr.fo